# Útróðrarbátarnir á Sandi draga svart

**Hóast lítil og eingin útróður hevur verið seinastu tíðina, tí veðrið hevur verið so vánaligt, er ikki líkt til, at nakar serligur fiskur er at fáa, tá ið roynandi er**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nornagestur og Kolumbus, sum vanliga leggja veiðina upp á Sandi, eru í løtuni til eftirlit. Mánadagin landaði Eysturbúgvin á Sandi. Mynd: Edvard Joensen*

Lítil og eingin útróður hevur verið kring landið seinasta mánaðin. Tað hevur viðrað illa í vetur, og sjáldan hava líkindi verið til at loysa bátarnar. Men leygardagin var ein hampiligur dagur, og soleiðis var eisini mánadagin.

Nakrir bátar av Sandi vóru á útróðri leygardagin, men sum skilst haðani, drógu teir at kalla svart, bæði eystanfyri og vestanfyri.

Tí er ikki líkt til, at steðgurin, sum hevur verið, nú líkindini hava verið so vánalig, hava gjørt, at fiskur er at fáa.

Sosialurin hevur tó frætt um bátar aðrastaðni, sum hava fingið upp í góð 100 pund á stampin. Men talan hevur sum heild ikki verið um teir stóru útróðrardagarnar.

Vit hava eisini frá onkrum, sum leygardagin var farin at fáa sær nøkur kók, men sum skilst, var heldur eingin snørisfiskur at fáa.

## Til eftirlit

Mánadagin landaði Eysturbúgvin á Sandi, men tá ið vit frættu haðani, høvdu tey fingið neyvu tølini.

Nornagestur og Kolumbus, sum plaga at leggja veiðina upp á Sandi, vóru inni seinasta hósdag við 160.000 pundum tilsamans, meginparturin upsi.

Á Sandoy Seafood siga tey, at upsin, sum skipini høvdu, var rættiliga smáur.

– Upsin hevur annars verið hampiliga góður í vetur, men nú er líkt til, at hann er smærri aftur.

Nornagestur og Kolumbus hava gjørt einar 2-3 túrar higartil í ár, men nú eru teir farnir á Tórshavnar Skipasmiðju til eftirlit, sum helst fer at taka nakrar dagar.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 3, 2005
www.kaupthing.fo

# Dollarin styrknaður

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku komu fleiri áhugaverd lyklatøl úr USA. Prísvøksturin er rættiliga komin í andglettin, m.a. eftir at nakrir nevndarlimir í amerikanska tjóðbankanum, FED, eru farnir at óttast hægri prísvøkstur. Brúkaraprísirnir hækkaðu tó bert 3,3% í mun til desembur 2003, og tað var eitt vet minni enn væntað. Tað tóku lánsbrævamarknaðirnir sum eitt tekin um, at FED eisini framyvir fer at hækka rentuna hóvliga. Tí lækkaðu lánsbræva-renturnar eftir kunngerðina. Sera týdningarmikið fyri fíggjarmarknaðirnar var eisini kunngerðin av, hvussu nógv útlendskir íleggjarar høvdu keypt amerikonsk virðisbrøv fyri í novembur. Netto varð keypt fyri heilar 81 mia. dollarar, har tað var væntað 59 mia. Tað hevði við sær, at dollarin helt áfram at styrkjast mótvegis evruni.

Í ár er dollarin styrknaður frá 1,36 til 1,30 dollarar fyri evruna. Høvuðsorsøkin er ein lóg, sum kom í gildi 1. januar, ið ger tað møguligt hjá virkjum, sum hava inntøku standandi uttanlands, at flyta hesa inntøku til USA, har hon so einans verður skattað við uml. 5%, mótvegis umleið 35% áður. Hetta verður tó bara gjørligt í ár, og tí vænta íleggjarar, at fleiri fyritøkur fara at flyta stórar upphæddir inn í USA í næstum. Eftirsum fyritøkurnar verða noyddar at veksla hesar upphæddir til dollarar, styrkir hetta dollaran í mun til flest onnur gjaldoyru.

IBM, Yahoo! og Motorola kunngjørdu øll góð inntøkutøl í farnu viku. Kortini hevur serliga Motorola ávirkað marknaðirnar um okkara leiðir, tí metingarnar hjá Motorola um 1. ársf. í ár vóru nakað daprar. Hesi tíðindini hava ávirkað kursin á Ericsson og Nokia, ið lækkaðu ávíkavist 5,2% og 6,7% í farnu viku. Hósdagin kunnger Nokia sjálvt roknskap. Um Nokia verur bjartskygdari um komandi tíðina og roknskapurin annars verður góður metur Kaupthing, at Nokia kann vinna stóran part av lækkingini aftur. Annars kunngera eisini m.a. Texas, Microsoft, Siemens, Novo og H&M hesa vikuna. Serliga Microsoft kann fáa avgerandi týdning fyri, hvussu vikan fer at hilnast fyri partabrøv.

Hesa vikuna koma fleiri áhugaverd lyklatøl. Úr USA koma BTÚ-tøl fyri 4. ársfjórðing, brúkaraálit og privat nýtsla. Úr Evropa er tað Týskland, sum stendur ovast á breddanum. Haðani koma brúkaraprísvøkstur í ymsu landspørtunum, umframt vinnuálit.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,45% | 0,01% |
| 5 ára lánsbræv | 2,99% | 0,00% |
| 10 ára lánsbræv | 3,67% | -0,05% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 286,1 | -1,0% |
| OMX, Svøríki | 735,1 | -1,0% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.940,9 | -0,2% |
| S&P 500, USA | 1.167,9 | -1,4% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,88 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 172,41 | 0,3% |
| Norrøn Partabrøv | 85,58 | -1,3% |
| Altjóða Vøkstur | 59,90 | 1,1% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,71 | 0,6% |
| EUR | 7,44 | 0,0% |
| GBP | 10,71 | 0,9% |
| NOK | 0,91 | -0,1% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*